

[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 29 - 12 - 2012

# Stórur áhugi fyri Jobmatch

Ongantíð áður hevur luttøkan verið so góð á Jobmatch sum í ár. Talið av luttakandi fyritøkum var 25 og var harvið met, og eisini talið av vitjandi setti met í mun til tær tríggjar undanfarnu Jobmatch stevnurnar. Umleið 300 lesandi og onnur løgdu leiðina til Fabrikkina hjá Østrøm, har stevnan varð hildin fríggjadagin og fríggjakvøld. Hetta eru væl fleiri enn í fjør. Góða luttøkan á Jobmatch undirstrikar tørvin á einum dialogi millum vinnuna, politisku skipanina og tey lesandi. Her varð so settur skjøtil á. Katrin Gregersen, ein av fyriskiparunum sigur seg vera sera væl nøgda við tiltakið, sum uttan iva er komið fyri at verða verandi. Hon sigur, at teir mongu básirnir vórðu væl vitjaðir, og mong vóru eisini til framløgurnar. Hon sigur við útvarpið hjá Kringvarpinum í dag, at tey vitjandi vóru helvt um helvt lesandi og føroyingar við lidnari útbúgving. Har vóru fólk innan allar hugsandi greinar so sum løgfrøði, verkfrøði og heilsurøkt. Rættiliga stórur áhugi var eisini hjá teimum vitjandi at frætta, hvat føroysku fyritøkurnar í olju- og frálandavinnuni hava at bjóða. Hesar vóru Atlantic Petroleum og Skansi Offshore, sum eru fyritøkur við stórari framgongd og vøkstri. Katrin Gregersen sigur, at hugaligt er at síggja umboð fyri vinnuna og tey lesandi í einum góðum dialogi, sum umframt arbeiðspláss eisini kann hava við sær praktikpláss og ynskið at fáa lesandi at gera ritgerðir fyri vinnuna. Um kvøldið var skipað fyri einum panelorðaskifti, har umboð fyri landsstýrið, Vinnuhúsið og Tórshavnar Kommunu luttóku. Eisini her møttu fitt av fólkum at hoyra panelluttakararnar seta orð á, hvør hevur ábyrgdina av at fáa tey lesandi at koma heimaftur til Føroya eftir lidnan lestur. Niðurstøðan var m.a., at ábyrgdina hava bæði politikarar og vinnan og tey lesandi. Víst varð á, at tað hevur týdning at kunna fáa føroyingar, sum eru lidnir at lesa og vilja fara heimaftur undir eina ALS stuðulsskipan, meðan tey bíða eftir